Tórbjørn Jacobsen:

# Ongin kann trúgva kanningini

**Ikki ein einasti føroyingur kann trúgva einum orðið í kanningini, har fulltrúðar hjá løgmanni, vinnumálaráðharranum og løgmansstjóranum sita og kanna seg sjálvar, sigur Tórbjørn Jacobsen**

KANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Ikki ein einasti føroyingum fer at trúgva niðurstøðuni í kanningini, sigur Tórbjørn Jacobsen*

Tórbjørn Jacobsen, framsøgumaður Tjóðveldisfloksins, heldur, at gongdin í málinum við Bjarna Djurholm og Dagmar S. Joensen hevur verið marghháttlig.

– Nú fer Løgmansskrivstovan so at gera eina kanning av sær sjálvari, tí í brævi sínum til løgmann nevnir Dagmar løgmansstjóran, har ið løgmansstjórin hevur verið í politiskum ørindum og ringt til nevndina í Framtaksgrunninum, um hvat í landsstýrismaðurin í vinnumálum kundi ganga við til av politiskum orðingum í samband við søluna av fiskavirking. Tað vil siga, at fulltrúðar undir løgmanni, vinnumálaráðharranum og løgmansstjóranum fara at kanna tey trý, og eg rokni ikki við, at tað ikki verður ein einasti føroyingur, sum fer at trúgva tí niðurstøðuni, sum stendur í eini kanning av fultrúðum undir teimum trimum, sigur Tórbjørn Jacobsen, framsøgumaður Tjóveldisfloksins. Tórbjørn Jacobsen setir eisini spurnartekin við niðurstøðuna í málinum, tí hvør skal rokna við at tey fólkini fara at ganga ímóti løgmanni, vinnumálaráðharranum og løgmansskrivstovuni, spyr Tórbjørn Jacobsen.

– Ongin í einum sivilliseraðum landi kann sita og kanna seg sjálvan, staðfestir Tórbjørn Jacobsen.

### Líka nógv politikkur sum jura

Tórbjørn Jacobsen gevur heldur ikki nógv fyri, at Maiken Johansen er sett á kanningina sum uttanhýsis løgfrøðingur, sum skal meta um tilfarið í kanningini, tí sambært honum verður tað bara gjørt, fyri at onkursvegna legalisera kanningina.

– Nú royna tey so at gera trupulleikan so juridiskan, men eftir mínum tykki er trupulleikin minst líka nógv ein politiskur trupulleiki, sigur framsøgumaður Tjóðveldisfloksins.

### Minnir um Titanic

Spurdur um, hvat hann heldur um trúvirðið hjá løgmanni í øllum hesum, er Tórbjørn Jacobsen ikki lítið bersøgin. – Trúvirðið hjá løgmanni bara søkkur fyri hvønn dag. Hetta minnir um Titanic, har tíðindatænastur, spindoktorar í Bjørt Samuelsen eru orkestrið, sum blívur við at spæla meðan Titanic søkkur. Men spurningurin er bara, hvussu longi teir klára at spæla, áðrenn Titanic er sokkin, heldur Tórbjørn Jacobsen.

Spurdur um teir fara at leggja málið um løgmann inn fyri landsstýrismálanevdina, svarar Tórbjørn Jacobsen, at løgmaður hevur rætt í, at málið snýr seg um tvey ting – tað politiska og juridiska. – Men í politisku skipanini er tað bara eitt sum er nøktandi í førum sum hesum, og tað er at ein kanningarstjóri verður settur. Hetta sum hendir nú, er politiski mátin at arbeiða uppá, har løgmaður keypir sær tíð í málinum, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum samstundis spyr, hvat teir kunnu gera. – Vit sita í anstøðu og tingið kemur ikki saman á Ólavsøku, so hvat hendir til ta tíð fáa vit at síggja, er seinasta viðmerkingin frá Tórbjørn Jacobsen, framsøgumanni í Tjóðveldisflokkinum.

# Málið kann roynast í rættinum

**Arbeiðið við løgfrøðiligu kanningini av Bjarna Djurholm, er byrjað. Tað er løgmansskrivstovan sum stendur fyri kanningini, og Maiken Johansen eisini knýtt at kanningini, sum uttanveltaður løgfrøðingur. Kanningin skal ætlandi vera liðug áðrenn Ólavsøku**

KANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í gjár kunngjørdi løgmaður, at løgfrøðiliga kanningin um Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, hevur framt brot á lóggávuna í sínum samskifti og sambandi við nevndina í Framtaksgrunninum.

Áðrenn løgmaður gjørdi av at seta kanningina í verk, vóru tað fleiri politikkarar, ið vístu á, at tað var hansara skylda sambært stýrisskipanarlógini at taka málið um Bjarna Djurholm upp. Hetta hevur løgmaður nú gjørt, og er tað í samsvar við §33 stk. 3 í stýrisskipanarlógini, har tað stendur, at tað er løgmaður, sum hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

Kanningin fevnir um tíðarskeiðið eftir 3. februar 2004, tá núverandi landsstýrið tók við. Orsøkin til, at tað ikki verður farið longur aftur er, at tíðarskeiðið áðrenn fellur uttan fyri heimildirnar hjá løgmanni.

Í Útvarpinum í gjár segði løgmaður, at kanningararbeiðið helst skal vera liðugt áðrenn Ólavsøku, men at kanningin má taka tað sum er neyðug. Harvið er tað ikki ósannlíkt, at kanningararbeiðið fer at vara longur enn til Ólavsøku.

### Kann roynast í rættinum

Nú hevur løgmaður sett eina løgfrøðiligakanning í verk, men í Sosialinum týsdagin segði Jógvan Páll Lassen, advokatur hjá Dagmar S. Joensen, at hann hevur ilt við at síggja meiningina við eini slíkari kanning. Og í stuttari viðmerking til Sosialin sigur Jógvan Páll Lassen, at tey eftir at hava sæð arbeiðssetningin hjá løgmansskrivstovuni, framvegis ikki hava broytt støðu.

Sum Tórbjørn Jacobsen er inni á aðrastaðni her á síðuni, so er ein møguleiki at seta ein kanningarstjóra, í staðin fyri at gera eina løgfrøðiliga kanning sum hesa. Ein triðji møguleiki, har full greiða fæst í málinum, er at royna tað í rættinum, tí har hava vitni skyldu at svara spurningurin og tey hava skyldu at siga satt.

Men Jógvan Páll Lassen, sakførari hjá Dagmar S. Joensen, sigur, at enn er ongin avgerð tikin um tað, so at tað fær hann onki sagt um enn.

## Arbeiðssetningurin hjá Løgmansskrivstovuni

Sambært Marjun Hanusardóttir, er yvirskipaði arbeiðssetningurin hjá teimum í fráboðanini, sum løgmaður sendi út í gjár.

Í skrivinum stendur millum annað "Løgmansskrivstovan er nú farin undir løgføðiligu kanningina av, um landsstýrismaðurin hevur framt brot á lóggávuna í sínum samskifti og sambandi við nevndina.

Kanningin verður gjørd samsvarandi stýrisskipanarlógini §33 stk. 3, sum sigur, at løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt."

Fyri at kanna, um ákærurnar móti Bjarna Djurholm er sannar, sendi Løgmansskrivstovan hetta skrivið út í gjár, til allar verandi og fyrrverandi nevndarlimir í Framtaksgrunninum eftir 3. februar 2004, og starvsfólki í sama tíðarskeiði:

Undirritaði (Sjúrður Rasmussen, blðm.) er farin undir fyrireikingarnar til rættarliga eftirlitispartin. Í hesum viðfangi fari eg at heita á tygum um at vera so beinasamur/som at svara mær hesum spurningum:

1. Hava tygum eftir 3. febuar 2004 havt samskifti við Bjarna Djurholm, landsstýrismann ella nakran embætismann/kvinnu í Vinnumálaráðnum um viðurskifti Framtaksgrunsins ?
2. Hava tygum eftir 3. febuar 2004 sjálv/ur hoyrt ella sæð samskifti millum annan nevndarlim í Framtaksgrunninum og Bjarna Djurholm, landsstýrismann ella nakran embætismann/kvinnu í Vinnumálaráðnum um viðurskifti Framtaksgrunsins ?
3. Um so er, hvønn dato hevur samskiftið verið, ella nær umleið, við upplýsingi um tað var við brævi, telduposti, telefon ella á fundi og um tygum, Framtaksgrunnurin ella Vinnumálaráðið tók stig til hetta samskiftið.
4. Fyri hvørt einstakt samskifti fari eg at spyrja hvørt
   **a.** Landsstýrismaðurin ella embætismaðurin gav til kennar, hvussu ávís heimild hjá nevnarlimunum sbr. viðtøkunum átti at verið útint og tá viðvíkjandi hvørjum og á hvønn hátt ?
   **b.** Um tygum uppfataðu útsøgnina sum boð ella leyst prát ?
   **c.** Um tað í samskiftinum beinleiðis ella óbeinleiðis vóru nevndar nakrar avleiðingar fyri tygum, um tygum ikki fóru at útinna nevndarheimildirnar á tann skitseraða háttin ?

Hava tygum liggjandi brøv, notatir ella annað skjalatilfar viðvíkjandi nevnda samskifti, farið eg at loyva mær at biðja um avrit.

Svarfreistin er sett til 19. juni 2006.

## Landsstýrismálanevndin óvirkin í løtuni



Í stuttari viðmerking í Sosialinum í gjár, sigur Kári P. Højgaard, formaður í landsstýrismálanevndini, at tað ringasta sum kann henda er, at ivi verður sáddur um kanningina. Kári P. Højgaard er staddur í Grønlandi í hesum døgum, og fær tí ikki gjørt størvegis viðmerkingar til tað, Tórbjørn Jacobsen sigur í blaðnum í dag. Næstformaðurin í landsstýrismálanevndini, Karsten Hansen, er eisini burturstaddur, og tí er nevndin so at siga óvirkin í løtuni.

Úr Grønlandi sigur Kári P. Højgaard tó, at hann framvegis metir, at tað ringasta, sum kann henda fyri kanningina er, at ivi verður sáddur um hana. Men hann vil onki siga, um nevndin fer at taka málið upp, tá hon hon fær savnað seg aftur.

**RWD**